# Bestu umstøður til tey ferðandi

**Nú verður høgligari hjá teim ferðandi at hava viðføri við sær umborð á Smyril. Seinnapartin í gjár vórðu nýggju landgangirnir í Havn og á Tvøroyri tiknir alment í nýtslu. Ferðafólkini fegnast um úrslitið, og sum skilst er ætlanin at menna hetta økið enn meiri í framtíðini**

SAMFERÐSLA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Tvøroyri:** Fyrst skuldi tú draga viðførið umborð á Smyril. Síðani mátti tú draga tað aftur í land framvið persónbilum og lastbilum. Og síðani í land eftir bilrampuni.

Soleiðis hevur støðan verið hjá suðuroyingum síðani siglingin til Suðuroyar av álvara tók seg upp í sjeytiárunum. Og soleiðis hevur eisini verið við nýggja Smyrli. Inntil seinnapartin í gjár.

Fyri tey ferðandi til og úr Suðuroynni var hetta dagurin, tá nýggja farstøðin og nýggi landgangurin á Krambatanga og tann í Havn skuldu takast alment í nýtslu.

Hetta hendi við eitt lítið hátíðarhald á nýggju farstøðini, har fólk á fyrsta sinni sluppu inn í hesa nýggju atkomuhøllina.



*Ferðafólkini fegnast um nýggju farstøðina, og ikki minst um tað at tey nú sleppa undanat draga viðførið í land eftir bildekkinum*

## Góðar umstøður

Tey sum fóru suður við Smyrli á middegi sluppu at ganga í land, eins og vanligt hevur verið øll hesi árini. Men tey sum fóru norðuraftur seinnapartin í gjár vórðu samstundis tey fyrstu, sum nú kundu sleppa umborð í snotuligum og góðum umstøðum.

– Hetta er ein tiltrongdur bati fyri tey ferðandi til Suðuroynna. Nú kann alt avgreiðast bæði skjótt, trygt og væl, segði Andras Jensen, sum umboðaði Strandferðsluna við hátíðarhaldið.

Enn er alt arbeiðið ikki liðugt, men í øllum førum er greitt, at tey ferðandi her hava fingið tær allar bestu umstøðurnar at sleppa umborð og í land.

Nýggja farstøðin er slakar 170 fermetrar til støddar og hevur m.a. eitt bíðirúm til 45 fólk. Arbeiðið hevur kostað góðar 4,5 mió. kr.

## Eftir tørvi

Hóast ein farstøð uppá 170 fermetrar kanska ikki tykist vera so stór, er kortini dentur lagdur á at gera hana so brúkiliga og kundavinarliga sum gjørligt.

Á samkomuni seinnapartin í gjár varð upplýst, at hon er gjørd eftir tí tørvinum sum mettur er í dag.

Men vísir tað seg, at tørvurin verður størri í framtíðini, so eru møguleikar at kunna útbyggja hana enn meiri.

Upplýst varð, at hon er lagað soleiðis til, at eru t.d. 900 ferðandi við Smyrli, so fer at ganga ein hálvur tími frá tí tey fyrstu fara í land og til tann seinasta.

## Ferðaseðlar í landi

Hjá teim ferðandi verður nú gjørligt at sleppa umborð á Smyril gjøgnum trappurnar. Men fyri tey sum eru illa gongd ella hava tungt viðføri ber til at nýta lyftina ístaðin.

Í farstøðini fer eisini ein kunningardiskur at halda til, har tey ferðandi kunnu fáa avgreitt sínar mongu spurningar um ferð, ferðslu og annað viðvíkjandi ferðavinnuni í oynni.

Ætlanin er somuleiðis, at fólk skulu kunna keypa ferðaseðlar sínar her, áðrenn farið verður umborð á Smyril.

Júst hetta arbeiðið er ikki liðugt enn, men arbeitt verður við at finna eina loysn á hesum málinum eisini.

Endamálið er stutt og greitt, at tá tey ferðandi eru komin umborð á Smyril skulu tey hava keypt ferðaseðlar sínar á farstøðini.

## Alt tekur tíð

Hjá suðringum man henda nýggja farstøðin koma sum ein stórur lætti.

Tað skiltist greitt á fólki seinnapartin í gjár, at ein loysn sum henda hevur manglað leingi.

Men nú er ein so komin hetta stigið víðari.

Arbeiðið við samferðsluhavnini er kortini ikki liðugt enn. Ætlanin er at halda fram við menningini av hesi. Sum skilst, er skulu pakkhús somuleiðis byggjast á staðnum.

Sum sagt varð: – Alt tekur tíð, men henda farstøðin er so avgjørt ein bati hjá fólki.

Hjá Kunningarstovuni verður eisini talan um batnaðar umstøður. Ein diskur er gjørdur til hesa tænastuna, og tí er lítið at ivast í, at henda nýggja farstøðin fer at verða teim ferðandi til stóra hjálp.



*Stjórin á Landsverki, Oyvindur Brimnes upplýsti, at gerst tað neyðugt, so kann nýggja farstøðan byggjast út vestureftir*

## FAKTA

**Ferðafólk á Suðuroyarleiðini**

Tøl yvir ferðafólk við Smyrli nakrar ávísar mánaðir. Vert er at leggja merki til, at nýggi Smyril varð settur í sigling í november mánaði 2005.

**Oktober**

| 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|
| 12.535 | 12.908 | 10.108 |

**November**

| 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|
| 10.815 | 10.015 | 14.398 |

**Desember**

| 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|
| 10.608 | 10.018 | 13.503 |

**Januar**

| 2003 | 2004 | 2005 | 2006 |
|---|---|---|---|
| 8.420 | 8.891 | 10.317 | 12.035 |

(Kelda: Strandferðslan)